

*Steve Linnard, sum her sæst saman við Johan Mortensen, er ovurfegin um, at felagið er komið í slíka lyklastøðu*

# Anadarko í lyklastøðu

**-við í báðum basalt-brunnunum**

**BASALTBRUNNAR**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eitt av oljufeløgunum, sum er komið í eina lyklastøðu, nú avtala loksins er gjørd um at bora tveir brunnar inni á basaltinum komandi tvey árini er amerikanska oljufelagið Anadarko. Tá fyrstu loyvini vórðu latin á landgrunninum í 2000 valdi Anadarko at vera varið og ikki binda seg til at bora nakran brunn í fyrstu atløgu. Felagið valdi at byrja spakuliga við at vera við í tveimum 9 ára loyvum, har tað í øðrum varð fyristøðufelag. Lagnunar speisemi skuldi gera, at felagið skjótt seks ár seinni bráddliga skuldi gerast partur av tveimum spennandi brunnum. Orsøkin var tann, at feløgini við boriskyldum ynsktu at flyta sínar brunnar inn á tey bæði 9 ára loyvini, sum Anadarko er partur av. Og soleiðis bleiv Anadarko virkin partur í tveimum brunnum, í øðrum við umleið 25% og hinum umleið 13%.

Steve Linnard, leiðandi jarðfrøðingur hjá Anadarko var við til at undirskriva avtaluna millum tey átta oljufeløgini í Oljufyrisitingini í farnu viku. Hann sigur, at fyri Anadarko er henda avtalan einki minni enn ein gjøgnumbrot, tí herfyri var felagið eisini við til at gera avtalu um enn ein brunn inni á basaltinum, saman við BP og Shell.

- Báðar hesar avtalur hava stóran týdning fyri okkum. Við hesi seinastu avtaluni sleppa vit longu í gongd við at bora um minni enn eitt ár, og úrslitið av tí boringini kann blíva, at tað tá fæst at vita, um grundarlag er fyri eini olju- og gassvinnu í Føroyum.

Steve Linnard dylur ikki fyri, at tað hevur stóran týdning fyri teir at vera við í tveimum brunnum. -Tá vit søktu og fingu eitt 9 ára loyvi í 2000 dugdu vit ikki at ímynda okkum, at vit skuldu enda í eini slíkari støðu tvs. frá als ikki at vera við í nakrari boriskyldu bráddliga at vera partur av tveimum týðandi brunnum. Hetta er so ein stór og spennandi avbjóðing fyri felagið, sum annars hevur brúkt nógva orku uppá kanningar, sum nú liggja sum grundarlag fyri serstakliga annan av basaltbrunninum, nevniliga tann, sum skal borast saman við BP og Shell, eisini nevndur sum William-prospektið.

Bjarni Djurholm, oljumálaráðharri:

# Oljubrunnar kæ

**- Hetta er ein stór løta og eitt týðandi vegamót, nú vit aftur fáa eina boring á føroyskum øki. Vit fara at síggja økt virksemi, sum vónandi kann gagna okkara vinnulívi bæði á sjógvi og á landi og geva tí nýggjar, spennandi og mennandi uppgávur og møguleikar.**

**OLJULEITING Á VEGAMÓTI**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, nú enn ein avtala er gjørd millum oljufeløg og føroyskar myndugleikar um at bora inni á basaltinum. Hetta hendi í farnu viku, tá umboð fyri 8 oljufeløg og føroyskar oljumyndugleikar hittust. Fyri tíð síðani var ein líknandi avtala gjørd millum 3 oljufeløg og myndugleikarnar.

Landsstýrismaðurin er serliga fegin um, at feløgini ikki hava mist vónina men tvørturímóti vilja fara undir enn størri avbjóðingar, sum so eisini kunnu vísa seg at geva nakað aftur. -Tað er tí stak positivt, at feløg, sum í heimshøpi eru stór, framvegis vísa okkara øki stóran áhuga. Raka tey við kolvetni, so fer áhugin at økjast munandi, og tað vil framskunda veruligar oljuboringar, soleiðis at vit um fá ár væntandi kunnu finna olju í rakstrarverdugum nøgdum.

### Tíð at fyrireika okkum

Bjarni Djurholm er ikki samdur við tey, sum siga, at oljan verður ein vanlukka fyri eitt so lítið samfelag sum tað føroyska. -Vit koma ikki at framleiða olju tey fyrstu nógvu árini, og tí hava vit rúmar møguleikar at fóta okkum, um vit finna olju og vilja taka hana upp. Hinvegin fer virksemið at ávirka alla tænastuvinnu og aðra vinnu í Føroyum, sum aftur fer at leggja lunnar undir menning av øllum handaslag innan handverk og hvørt av sínum. So eg síggi oljuvinnu heldur sum ein møguleika enn ein trupulleika. Í síðsta enda er tað upp til politiska myndugleikar at meta um, hvussu man fordeildir tað, sum kemur burtur úr. Men eg eri sannførdur um, at oljan kann vera við til at stabilisera hetta samfelagið, soleiðis at vit koma at uppliva ein meira stabilan búskap enn frammanundan sigur landsstýrismaðurin og leggur aftrat:

- Finna vit olju kunnu nógvir pengar koma í umfar, og tá er tað ein politisk uppgáva at plasera pengarnar soleiðis, at teir ikki skaða verandi vinnur. Tað hava vit tíð til at fyrireika okkum til. Oljan kann eisini vera við til at skapa eina eksponering av Føroyum sum samfelag.

Bjarni Djurholm sær ikki oljufeløgini sum nakran vanda, hóast tey við jøvnum millumbilum eru fyri atfinningum í øðrum londum. -Tað sigur seg sjálvt,



# rkomnir fyri vinnulívið




Kortið sýnir, hvar komandi leitingarbrunnarnir verða boraðir



*Landstýrismaðurin ivast ikki í, at komandi leitingarumfarið fer at skapa hópin av aktiviteti til føroyskt vinnulív*

at stóru oljufeløgini vilja gera alt fyri at bera seg rætt at í okkara parti av heiminum, skulu tey sleppa at arbeiða her. Tey taka stór atlit til at reka skilagóðan starvsfólkapolitikk, umhvørvispolitikk osfr. Tí síggi eg ongan vanda í at fáa hesi stóru oljufeløg henda vegin. Tað áliggur teimum eisini at gera sítt arbeiði til lítar, tá tey fáa so stóra ábyrgd.

Oljumálaráðharrin vísir á, at leitingin komandi tvey árini fer at hava sera stóran týdning fyri eina triðju útbjóðing, sum longu er sett út í kortið at byrja um knapp tvey ár. -Verður olja funnin í komandi boringunum, antin í rakstrarverdugum nøgdum ella í so mikið stórum nøgdum, at hon eggjar til fleiri boringar, so kann tað gera, at stórur áhugi verður fyri 3. útbjóðing.

### Gott við tveimum føroyskum feløgum

Bjarni Djurholm er annars sera fegin um, at bæði tey føroysku oljufeløgini eru við í komandi boring. -Nú hava tey hvør sín profil. Annað leggur seg eftir teimum stóru satsningunum, meðan hitt spjaðir váðan meira. Tað eru tveir ymsir hættir at virka uppá, og tað er eisini áhugavert, tí tá hevur tú møguleika í framtíðini at síggja, hvør er tann besta strategiin, og tað gevur okkum eisini betri møguleika fyri at í hvussu er annað felagið, um ikki bæði, kunnu fóta sær í føroysku oljuvinnuni.

Uppá fyrispurning um ikki pláss er fyri fleiri oljufeløgunum á føroyamiðjunum sigur landsstýrismaðurin, at tað er pláss fyri teimum, sum vilja liva upp til tey krøv og tær treytir, sum vit seta. -Tað eru vit, sum seta treytirnar, og eg haldi, at okkara myndugleikar hava gjørt eitt gott arbeiði og eru væl fyrireikaðir, og tí vilja feløgini eisini geva seg undir hesar treytir. Og øll eru vælkomin, sum taka undir við teimum treytum, sum vit seta teimum. Og tess fleiri feløg vísa áhuga tess betri møguleika hava vit eisini at handla tvs. at vit fáa tað til samfelagið, sum tænir tí best.

## Tímalønin hækkar 50%

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya (BLF) og Fíggjarmálaráðið hava í dag gjørt semju um 2-ára sáttmála, ið byggir á lønarvøkstur á 2,6% nominelt. Hartil hækkar tímalønin fyri konsulentarbeiði við 50%**

BLF-SÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*

Sjálvur lønarvøksturin í sáttmálanum er 0,9% nú og 1,7% næsta ár, men hartil er talan um fleiri aðrar ábøtur á sáttmálan.

Í tíðindaskrivi sigur BLF, at tey fegnast um, at partarnir eru samdir um at orða ein felags almennan stjórasáttmála, soleiðis at búskapar- og løgfrøðingar, ið verða settir í stjórastørv, framyvir verða fevndir av serstøkum stjórasáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF o.o.

Hartil er ínýggjasáttmálanum ásett, at tímalønin fyri konsulentarbeiði hjá BLF-limum verður hækkað úr 300 kr. í 450 kr. At ásetingarnar um, hvørjar útbúgvingar eru fevndar av sáttmálanum og hvussu tær verða flokkaðar, verða endurskoðaðar, at endurgjaldið fyri tænastuferðir framyvir støðugt verður dagført, at serstaka frívikan verður sett inn í sáttmálan hjá BLF, at álitisfólkaavtalan verður endurskoðað og dagførd, at avtalan um starvsfólkapolitikk verður betrað við atliti til eldrapolitikk og eftirløn, at strategisk og skipað førleikamenning nú skal fremjast í verki.

Hinvegin er BLF ikki serliga fegið um, at Landstýrið framhaldandi tengir eftirlønina at LÍV, soleiðis at frælsið hjá limunum at velja eftirlønarskipan verðuyr skert. Eitt frælsi, sum felagið heldur vera fortreytina fyri, at kapping kemur á eftirlønarøkið. Limir hjá BLF, sum ikki eru í starvi hjá tí almenna, hava tó frítt at velja, hvørja eftirlønaruppsparing tey vilja hava.

# Vinnaraloysn fyri allar partar



BASALTBRUNNAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

-Vit eru væl nøgdir. Hetta sær út til at vera ein vinnaraloysn fyri allar partar sigur Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess. Hann heldur tað vera rætt og náttúrligt, at Statoil er fyristøðufelag, nú tað frammanundan er tað í tveimum av teimum trimum loyvunum, sum her verða løgd saman. Hann heldur somuleiðis, at uttan mun til úrslitið av boringini, so verður tað áhugavert.

- Nú hoyrir man oftani, at Amerada Hess er við at taka seg úr Atlantsmótinum!

- Vit eru við bæði við Føroyar og í bretskum øki. Man ger tað, sum ein heldur vera hóskandi í einum øki. Tað vil altíð vera so, at møguleikar eru kring allan heim, og man fer har teir bestu møguleikarnir eru.

Meðan bæði BP og Statoil hava latið síni loyvi frá 1. útbjóðing aftur til føroyskar myndugleikar nakað áðrenn tíðina, so hevur Hess gjørt av at bíða, tí nakað er eftir av arbeiðsprogramminum, av førleikamenning og øðrum.

# Atlants Kolvetni ætlar sær týðandi upplýsingar

**Føroya oljufelagið Atlantic Petroleum hevur ikki ynskt at vaksa um sín lut í nýggja basaltbrunninum, hóast tað hevði møguleika til tess. Felagið metir upplýsingarnar tað kann fáa vera meira týðandi enn ein størri prosentpart í boringini**

BASALTBRUNNAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni er sera fegin um nýggju avtaluna um at bora á basaltinum í 06 Henda nýggja avtalan er partur av tí fyrstu avtaluni felagið gjørdi við Faroes Partnership, har AP eina rættiliga góða avtalu, og sum síðani hevur verið týdningarmesti byggisteinurin í menningini av felagnum.

Hann sær nógvar fyrimunir við avtaluni: - Vit sleppa at fylgja við í brunninum, sum vit upprunaliga vóru partur av.



*Stjórin í Atlantic Petroleum heldur, at nýggja avtalan sýnir tað skilagóða arbeiðið, sum felagið longu legði í fyrsta leitingarumfarið*

Hetta er eitt sera áhugavert og stórt prospekt. Tað økir eisini um skaran av feløgum, sum vit samarbeiða við. Og tað hevur víst seg, at tað eru har møguleikarnir skapast, nevniliga í samstarvi við onnur feløg.

Í 1. útbjóðing luttók AP við 0,1 % men hevði rætt til at økja um partin til 5% í eini optión. Í nýggjastu avtaluni heldur henda optión fram. Nú hevur felagið tó minni part, tilsamans 0,03 og kann tað fara uppá 1,3% í eini møguligari optión.

Wilhelm Petersen vísir á, at tað var ein sera góð avtala felagið gjørdi í síni tíð, og sum nú verður flutt víðari til nýggju boringina tó við færri prosentum, nú nógv fleiri feløg eru um at býta køkuna.

- Nú PetroCanada ikki vildi vera við í hesi avtaluni skilst, at Atlants Kolvetni kundi vaksið munandi um sín part. Hvussu ber tað til, at tit ikki tóku av hesum møguleika?

- Vit hava alla tíðina havt ta strategiina at varðveita avtaluna frá loyvinum frá 1. útbjóðing. 1,3% í einum stórum fundi er eisini rættiliga áhugavert fyri AP, og ikki minst tann sannroynd, at vit hava atgongd til tey data, sum koma frá hesum brunninum, og sum vit kunnu brúka víðari í tveimum øðrum loyvum, sum vit eiga 40% í.

Wilhelm Petersen staðfestir, at Atlants Kolvetni við hesi avtaluni tekur ongan váðan men varðveitir møguleikan at vaksa um sín part.

- Vit hava einki ynski havt um at økja henda partin enn meira men heldur varðveita somu strategiina.

- Hevði tað ikki verið meira hugaligt fyri tykkara partaeigarar, nú tit eru við í eini spennandi boring, at tit átóku tykkum størri part, tí tá vildu inntøkurnar verið tilsvarandi størri, um rakt verður við olju?

- Vit hava sum sagt 40% í tveimum øðrum loyvum, sum er ein rættiliga stór eksponering í hesum økinum.

# Kenst sum ein lætti

**-nú loksins er eydnast at fáa báðar basaltbrunnarnar uppá pláss sigur Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini**

BASALTBRUNNAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

- Tað er sera gott og ein lætti, at henda avtalan nú er komin uppá pláss. Tað hevur tikið langa tíð, lutvíst tí vit skuldu semjast við feløgini, og tey skuldu semjast innanhýsis. Men tað hevur verið tað vert sigur Sigurð í Jákupsstovu.

Hann metir sjálvur, at vit føroyingar hava fingið tað burtur úr, sum ein kundi ynskt sær, nú tveir brunnar blíva inni á basaltinum komandi tvey árini, ístaðin fyri teir fýra, sum eftir ætlanini skuldu borast í landssynningshorninum á landgrunninum. -Hetta eru tveir spennandi brunnar, sum í hvør sínum lagi fara at geva okkum sera týðandi upplýsingar. Og fyri tað um



*Stjórin á Oljufyrisitingini er sera spentur uppá, hvat komandi árini hava at bjóða eini møguligari føroyskari oljuvinnu*

annar miseydnast, so kann hin gerast ein succes. So samanumtikið ein sera góð tíð fyri føroyska oljuleiting við tveimum brunnum inni á basaltinum. At fasthaldið teir fýra brunnarnar hevði als ikki givið eins góða meining, sum tað, ið nú verður gjørt.

# Føroya Kolvetni ruddar slóð fyri framtíðini

BASALTBRUNNAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Stórhendingin við nýggju avtaluni um at bora á basaltinum í 2006 sæð við føroyskum eygum varð, at føroyska oljufelagið Føroya Kolvetni, sum als ikki var við nøkrum av samtøkunum frá 1. útbjóðing, nú fekk møguleikan at yvirtaka partin hjá PetroCanada, sum gjørdist 4% í nýggju avtaluni. Niels Sørensen er stjóri í felagnum, og hann er sera fegin um henda nýggja møguleika, men viðgongur, at hetta eisini er ein stór fíggjarlig uppgáva.

- Vit hava bara bíðað eftir hesum møguleikanum, tí í oljuverðini hevur tað verið frammi, at kanadiska felagið fór at taka seg úr økinum. Nú hendi tað so, og hetta hevur týdning fyri okkum á ymsan hátt. Tað hevur týdning, tí vit eru við í loyvi 009, sum liggur beint við síðuna av, og tí vit harvið fáa atgongd til boriupplýsingar frá loyvi 006, og tað hevur ikki minni týdning fyri okkara loyvi 0012, á Wyville Thomson rygginum har suðuri, tí har er talan eisini um basalt. So fyri okkum hevur tað eins stóran týdning at fáa upplýsingar til framtíðina í øðrum loyvum, sum tað er at vera við í sjálvari boringini.

Við hesi avtaluni hevur Føroya Kolvetni økt munandi um sín leiklut í leitingini eftir olju og gassi á Føroyaleiðini. -Men, leggur Niels Sørensen aftrat, vit mugu ansa eftir ikki at hava størri vónir enn neyðugt. Tí er talan um ein turran brunn, so skulu vit víðari kortini. Umráðandi er at vit ikki fara "niður í kjallaran" við bara einum brunni, og tí er gott, at tað verður enn ein boring í 2007.



*Eftir at hava sitið á síðulinjuni fyrsta umfarið, er Føroya Kolvetni nú beinleiðis partur av Føroya-økinum. Eitt stig, sum stjórin í felagnum fegnast um*